# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Nýggjur iX20 frá Hyundai

**Hyundai Matrix er nú avloystur av tí heilt nýggja iX20, sum er ein væl útgjørdur og praktiskur bilur í nýggja designstílinum hjá Hyundai**

Bilasølan Norðbil hevur fingið nýggja Hyundai iX20, sum er ein nútímans familjubilur við øllum tí, ið hoyrir til ein slíkan bil. Tað ein fyrst leggur til merkis við bilinum er designið, sum er í nýggja designstílinum hjá Hyundai.

Hyundai iX20 fæst bæði í bensin- og dieselútgávum. Allir bilarnir eru Blue Drive útgávur við stop/go, soleiðis at motorurin sløknar, tá bilførarin sleppur spitaranum sum t.d. við reytt ljós í eini ljósregulering. Hyundai iX20, sum kostar úr 195.000 krónum, kann síggjast og roynast hjá Norðbil við Oyggjarvegin.

*mg*






*Hyundai iX20 er ein spildurnýggjur og væl útgjørdur familjubilur*



*Toyota Hilux megnaði avbjóðingina á Suðurpólinum*

# Toyota Hilux á Suðurpólinum

Toyota Hilux er ein bilur, sum er kendur fyri slitstyrki og kvalitet. Bilurin verður ofta nýttur til ymiskar royndir, har hann fær prógvað sítt virði.

Á eini rannsóknarferð hjá granskingardeplinum fyri Antarktis í India, varð koyrt við fýra Toyota Hilux bilum á Suðurpólinum. Túrurin, sum var 4.600 kilometrar á ísinum, fór fram við 4-hjólsdrivnum Toyota Hilux, sum hóast tey 56 kuldastigini og hæddina upp til 3.400 metrar koyrdu ótarnaðir til málið. Túrurin varð gjøgnumførdur upp á fýra vikur.

Toyota Hilux megnaði avbjóðingina á Suðurpólinum, eins og hann hevur gjørt áður við íslendska gosfjallinum Eyjafjallajøkull og á Norðpólinum saman við Jeremy Clarkson, Richard Hammond og James May frá TopGear.

# MAZDA MX5 nýtt heimsmet

**Mazda MX-5 setur nú aftur met sum heimsins mest seldi bilur við tveimum sitiplássum.**

Samlaða sølan av kenda sportbilinum Mazda MX-5 er nú ko[...] bilar. M[...] fyrstu fe[...] í 1989, va[...] sportbilunum frá 60-unum og 70-un[...]

Mazd[...] ness Wo[...] sum he[...]

seldi persónbilur við tveimum sitiplássum. Seldir vóru [...]

Nýggja heimsmetið við 900.000 seldum bilum verður [...]




*Mazda MX-5 er heimsins mest seldi sportbilur við tveimum sitiplássum*

Hósdagin 10. februar kl. 16.10

VINNU- & BILRADIO
Hósdagin 10. februar kl. 16.10

**Í sendingini** verður vitjað á eina fyritøku á Skála sum í sama bygningi hevur Bil- og Dekkverkstaðin RagVag og Føroya Betongsaging. Samrøður eru við Símun Paula Johannesen verkstaðsleiðara um dekk- og bilverkstaðin og við stjóran Dia Mikkelsen um Føroya Betongsaging.

Eisini verður vitjað í handlinum Vøggan á Hálsi í Havn, sum selur barnavognar og barnaútgerð. Í sambandi við at handilin hesa vikuna letur upp í víðkaðum hølum og størri vøruúrvali, er ein samrøða við stjóran og eigaran Tóru Johansen.



Tóra Johansen



Símun Pauli Johannesen

Rás 2 titt radio